

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 10 - 2011

# Transocean-málið størri og størri

Tann sokallaða Transocean-gølan í Noregi, ið snýr seg um skattasvik í heilt stórum stíli í sambandi við handil við oljupallum, vindur støðugt upp á seg. Tað seinasta er, at nú hava norsku myndugleikarnir ákært ein av teimum norsku skattaráðgevunum hjá Transocean fyri grovt skattasvik. Norsku myndugleikarnir halda uppá, at skattavaldið fekk ikki allar viðkomandi upplýsingar, tá tað norska felagið Transocean seldi fleiri feløgum á Cayman Islands fleiri oljupallar í árunum frá 2002 til 2005. Myndugleikarnir siga, at tann nú ákærdi ráðgevin og høvuðsskrivstovan hjá Transocean í Houston í USA sendu skattavaldinum skeivar og ófullfíggjaðar upplýsingar, og at alt varð lagt nágreiniliga til rættis. Fyrr í ár ákærdu norsku myndugleikarnir tveir fyrrverandi ráðgevar og tvey Transocean-feløg fyri skattasvik í einum máli, sum uttan iva er tað største av sínum slagi nakrantíð í Noregi. Sambært norska bakmanspolitinum hevur Transocean dult tølini frá rakstri og sølu av tólv pallum. Í pengum snýr tað seg um 10 milliardir norskar krónur, sum skattavaldið ongantíð bleiv kunnað um. Revsingin fyri brot av hesum slagnum er upp í níggju ára fongsul, skrivar Aftenposten.